# Álit 2015

# Eftirskúlin á Drelnesi

## ungdómurin - okkara framtíð



**Til Mentamálaráðið**

**Àlit 2015 um eftirskúlan í Suðuroy.** Tórshavn, mikudagur, 18. mars 2015

Eftirskúlanevndin handar hervið landsstyrismanninum álit 2015 um eftirskúlan í Suðuroy. Álitið er partvís ein gjølligari viðgerð av teimum báðum undanfarnu álitunum, sum vórðu handað mentamálaráðharranum 28. september 2006 og 31. mai 2007.

Í 1990 setti landsskúlafyrisitingin eina nevnd, sum gjørdi eitt álit um eftirskúla í Føroyum. Hetta álit er dagfest desember 1990, og er eisini ein partur av hesum arbeiði, sum eftirskúlanevndin hevur greitt út hondum.

Eftirskúlanevndin er umboðað av Kommunufelagnum, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum og stigtakarunum.

Við vón um vælvild og gott samstarv lata vit álit 2015 um eftirskúla í Suðuroy landsstýrismanninum í mentamálum, Bjørn Kallsø, í hendi.

Virðingarmest

Heðin Mortensen
Kommunufelagið

Trugvi Gudmundarson
Kommunufelagið

Herálvur Jacobsen
Føroya Lærarafelag

Magna Thomassen
Skúlaleiðarafelagið

Olavur Rasmussen
Nevndarformaður

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

## Inngangur

Hóast nærum 15 ár eru liðin, síðan arbeiðsbólkur tók stig til at skipa eftirskúla í Suðuroy, skulu vit 25 ár aftur í tíðina at fyrsta álitið ella uppskotið um eftirskúla í Føroyum sá dagsins ljós. Men uppaftur longri er síðan, at eftirskúli, ætlaður føroyingum, varð settur á stovn í Danmark.

Ókunnugt fyri tey flestu man tó vera, at longu í sjeytiárunum vóru ætlanir um at skipa eftirskúla í Føroyum. Hesar ætlanir komu so mikið á leið, at søkt varð fleiri ferðir um loyvi at seta á stovn eftirskúla.[1] Fyrst í áttatiárunum varð enntá søkt um loyvi at byggja eftirskúla, men Landsskúlaráðið vildi ikki eftirlýka hesi umsókn við teirri grundgeving, at "nýggja fólkaskúlalógin, sum júst var sett í verk um sama mundið, bøtti nógv um møguleikarnar hjá fólkaskúlanum at skipa skúlagongdina hjá næmingunum eftir tørvinum hjá tí einstaka."[2]

Landsskúlaráðið metti, at tann tá nýggja fólkaskúlalógin skuldi roynast nøkur ár, áðrenn støða varð tikin til skipan av eftirskúla í Føroyum.[3] Úrslitið gjørdist, at ein eftirskúli fyri føroyskar næmingar varð skipaður í Danmark.

Á heystið 1986 varð eftirskúli skipaður í Genner í Suður Jútlandi. Hesin eftirskúli bar heitið Den Norrøne Efterskole, og var fyrst og fremst eitt tilboð fyri føroyskar næmingar. Á hvørjum ári vóru 35 – 40 næmingar á hesum eftirskúlanum. Táið flest næmingar søktu um at sleppa á henda eftirskúlan, var talið 60. Skúlaárið 1990 sluppu øll 38, ið søktu, inn á skúlan.[4]

Den Norrøne Efterskole virkaði eftir danskari eftirskúlalóg og skipan, og var í prinsippinum ein danskur skúli.[5] Kostnaðurin fyri at ganga á hesum skúla var tann sami sum fyri aðrar danskar eftirskúlar, men ein avis føroysk stuðulsskipan var galdandi.[6]

Í desember mánaða 1990 kom eitt nýtt álit um eftirskúla, tá ið nevnd lat Landsskúlafyrisitingi "Uppskot um hvussu eftirskúli kann verða skipaður í Føroyum". Táverandi landsskúlastjóri setti hesa nevnd. Álitið kveikir nógvar tankar, eisini í sambandi við innihaldið, men álitið er sjálvandi merkt av, at tá fanst eingin føroysk eftirskúlalóg.[7]

Alt hetta broytist 10 ár seinni, tá ið Føroya Løgting samtykkir lóg um føroyskan eftirskúla.[8] Endamálið við lógini er at skipa viðurskifti, áseta karmarnar og tann almenna stuðulin til eftirskúlar í Føroyum, soleiðis at áhugað kunnu fara undir virksemið.[9]

---

1 Eftirskúlafelagið varð stovnað 8. november 1979, og var tað hetta felag, sum gjørdi fleiri royndir at fara undir eftirskúlavirksemi í Føroyum.

2 Undirvísingar- og Mentamálastýrið (Umms.) j. nr. 10121/000181/2/SE, 01.03.00, p. 5

3 ditto

4 Álit, desember 1990. P.

5 ditto, p. 24

6 ditto, p. 24-25

7 ditto, p. 9-11

8 Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar

9 ditto, § 1

Nærum straks aftaná at lógin kom í gildið, taka borgarar í Suðuroy stig til at skipa ein eftirskúla. Áhugabólkurin[10] ella arbeiðsbólkurin arbeiðir leingi, ger eitt drúgvt fyrireikingararbeiði, og tað eydnast at fáa bæði kommunufeløgini[11] at taka undir við tankanum um ein eftirskúla, sum skuldi liggja í Hvalba.

Í kjalarvørrinum á hesum varð nevnd skipað, kallað eftirskúlanevndin, sum var mannað av einum umboði fyri smærru kommunurnar, einum umboði fyri stóru kommunurnar, og einum umboði fyri stigtakararnar, sum eisini var formaður.

28. september 2006 handaði eftirskúlanevndin Mentamálaráðnum álit, sum kallaðist Atlantic Adventure Eftirskúli (AAE). Álitið var samstundis ein umsókn um góðkenning av stovnsetan av einum eftirskúla í Hvalba. Bakgrundin fyri umsóknini var[12]:

* Løgtingslóg nr. 83, dagfest 17. mai 2000
* Stigtakararnir í Suðuroy
* Vitjan av eftirskúlaráðgeva úr Danmark oktober 2000
* Námsvitjan í Danmark apríl 2001
* Námsvitjan í Danmark september 2006
* Fundir við Mentamálaráðið, KSF og FKF.
* Nógvir ungir føroyingar fara hvørt ár á eftirskúla í Danmark.

AAE álitið viðger spurningin um floksbýti, og ger ta niðurstøðu, at rættast er at skúlin skal vera fyri næmingar, sum hava rokkið undirvísingarkravdan aldur. Talan er sostatt um 10. flokk og 11. skúlaaldur (upp til 18 ár).

Fleiri grundir verða lagdar fyri hesa niðurstøðu, men høvuðsgrundgevingin er, at tilboð skúlans ikki eru bundin at undirvísingarskylduni, og gevur hetta størri pedagogiskt frælsi, meiri rásarúm og fleiri møguleikar fyri variation í lærugreinum. [13]

AAE álitið letur eingan iva vera um, at 10. flokkur er tann árgangurin, sum hevur størsta tørvin á avbjóðandi skúlaskapi, soleiðis sum støðan er í 2006.[14]

Víst verður eisini á, at vansin við einum reinum 10. floks eftirskúla er, at skúlauppihaldið ikki verður relevant fyri næmingar, sum hava nátt eitt búningarstøði, ið ger næmingarnar til reiðar at fara undir eina ungdómsútbúgving aftaná 9. flokk. Byrgjast kann upp fyri hesum við at skúlin gevur tilboð um royndarflokkar, ið miða eftir próvtøku.[15]

---

[10] Í áhugabólkinum sótu Tummas í Dali, Jacob Vestergaard, Julius Holm og Ólavur Rasmussen

[11] Nýliga vórðu Kommunusamskipan Føroya (KSF, tær 7 stóru kommunurnar) og Føroya Kommunufelag (FKF, tær smærri kommunurnar) løgd saman í eitt felag, sum kallast Kommunufelagið. Formliga fór nýggja kommunufelagið til verka 1. januar 2014.

[12] AAE, p. 1

[13] AAE, p. 2

[14] AAE, p. 2

[15] AAE, p. 2

Um lýsingina av innihaldinum er stutt at siga, at grundstøðið í AAE álitinum er persónliga menningin av næminginum[16], og at undirvísingin alla tíðina hevur hesa menning sum endamál.[17]

Alt 2007 eru nógvar samráðingar við mentamálaráðið um eftirskúlan. Við ársbyrjan 2007 fekk eftirskúlanevndin bræv frá mentamálaráðnum[18], har sagt verður frá, at eftirskúlin er viðgjørdur á landsstýrisfundi, og at landsstýrismaðurin tí fer "at heita á arbeiðsbólkin saman við umboði úr mentamálaráðnum at gera eitt nágreiniligari útgreiningararbeiði, áðrenn umsóknin verður endaliga viðgjørd".

Skilað er í brævinum til, at útgreiningararbeiðið skal fevna um:

* Eina gjølliga tørvslýsing av einum eftirskúlatilboði
* Hvussu er ætlanin at skipa námsfrøðiliga innihaldið í eftirskúlatilboðnum
* Uppskot um møguligar broytingar í lógini um eftirskúlar serliga við atliti at leiðsluviðurskiftunum og fíggingini av rakstrinum
* Aðrir møguleikar við atliti at staðseting og hølum
* Hvørji umboðini í eftirskúlanevndini eru

31. mai 2007[19] handar eftirskúlanevndin[20] saman við umboði úr mentamálaráðnum umbidnað útgreiningararbeiðið. Eingin grund er til í hesum viðfangi at endurtaka innihaldið í útgreiningunum, tí at meginparturin gongur aftur í hesum álitinum, sum nú er greitt úr hondum.

Men politiska eftirspælið er relevant og áhugavert. Tí at úrslitið av útgreiningunum gjørdist, at mentamálaráðharrin[21] letur løgtingsskrivstovuni málið um eftirskúlan at leggja fyri tingi, við tilmæli um, at Føroya Løgting samtykkir at lata eftirskúla byggja sambært tilráðingini hjá eftirskúlanevndini.

Loksins sá út til, at málið um fyrsta føroyska eftirskúlan var rokkið.

Men 6. desember 2007 útskrivaði løgmaður nýval, við tí úrsliti, at løgtingsskrivstovan ongantíð náddi at lata løgtinginum málið um eftirskúlan, og fall málið sostatt burtur.

Í dag kunnu vit staðfesta, at vit mistu á stokkinum, og at tað ongantíð aftur eydnaðist nevndini av álvara at fáa mentamálaráðið at viðgera málið um skipan av føroyskum eftirskúla.

Tó skal sigast, at politiski myndugleikin øll árini hevur víst jaligan vilja, hóast einki ítøkiligt er spurst burtur úr. Í 2009 samtykti Føroya Løgting broytingaruppskot frá samdari

---

16 Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar, § 3

17 Í nýggjasta álitinum Februar 2015 er hesin parturin gjølliga lýstur.

18 Brævið er dagfest 24. januar 2007.

19 Skr. T 70-34110 / 2 Mál. T 060349 - 1

20 Í eftirskúlanevndini sótu Jens Marius Poulsen (KFS umboð), Anna Djurhuus (KFK umboð), Ólavur Rasmussen (formaður) og Janus Jensen umboðandi mentamálaráðið.

21 Landsstýrismaður í mentamálum var Jógvan á Lakjuni

Mentanarnevnd "Uppskot til samtyktar um eftirskúla í Suðuroy". Uppskotið varð einmælt samtykt.[22]

Føroya Lærarafelag og Skúlaleiðarafelagið hava í nógv ár sýnt stóran áhuga fyri eftirskúlamálinum. Nýggjasta dagføringin í spurninginum um eftirskúlan er, at eftirskúlanevndin er víðkað við tveimum limum, soleiðis at lærarafelagið og skúlaleiðarafelagið nú hava hvør sín lim í nevndini.[23] Henda víðkan av nevndini hevur stóran týdning fyri arbeiðið við eftirskúlanum, og stigtakararnir fegnast um, at lærarafelagið og skúlaleiðarafelagið hava tikið so væl ímóti áheitanini at gerast beinleiðis partur av arbeiðnum at skipa tann fyrsta føroyska eftirskúlan, sum skal vera í Suðuroy.

Sjálvandi kann spurningurin setast, um skilagott er at skipa ein eftirskúla í Føroyum.

Nevndin kann ikki annað enn staðfesta, at hóast 15 ár eru liðin síðan lógin um eftirskúla varð samtykt á Tingi, og hóast nevndin hevur verið virkin nærum øll hesi árini, so er málið um eftirskúlan enn órealiserað, men samstundis so ofta jaliga viðgjørt av øllum politiskum flokkum, at hetta má takast sum tekin um, at politisku Føroyar vilja hava ein eftirskúla settan á stovn.

[22] Løgtingsmál nr. 12/2009. Dagfest 4. august 2009. Uppskotsstillarar vóru Kári á Rógvi og Kristina Toftegaard Larsen. Uppskotið samtykt við 26 atkvøðum fyri, 0 ímóti og 0 blankar.

[23] Verandi nevndarlimir eru: Heðin Mortensen, umboðandi Kommunufelagið. Herálvur Jacobsen, lærarafelagið. Magna Thomassen, skúlaleiðarafelagið. Ólavur Rasmussen, umboðandi stigtakararnar. Kommunufelagið skal velja ein lim aftrat, sum skal umboða tær smærru kommunurnar.

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Bakgrund.

* Álit um føroyskan eftirskúla, desember 1990.
* Undirvísingar- og Mentamálastýrið, j. nr. 10121/000181/2/SE, 01.03.2000
* Løgtingslóg nr. 83, dagfest 17. mai 2000
* Stigtakararnir í Suðuroy
* Fundir við Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag
* Meginfelag teirra brekaðu (MBF) 25. februar 2000
* Vitjan av eftirskúlaráðgeva úr Danmark oktober 2000
* Námsvitjan í Danmark apríl 2001
* Fløðandi talið av ungdómum, sum fara á danskar eftirskúlar
* Álit, Atlantic Adventure Eftirskúli, 28. september 2006
* Námsvitjan í Danmark september 2006
* Eftirskúlablaðið
* Bræv frá Mentamálaráðnum, 24. januar 2007
* Álit, "Nágreiniligari Útgreiningararbeiði", 31. mai 2007
* Fyrireiking til at leggja málið fyri tingið, november/desember 2007
* Uppskot um Eftirskúla í Suðuroy einmælt samtykt av Føroya Løgtingi, 19.11.09
* Víðkan av nevnd til at umfata lærarafelagið og skúlaleiðarafelagið
* Framleiðslu- og vitanarhøvuðsstaður. Desember 2014

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Næmingaaldur.

Eftirskúlanevndin hevur í sínum drúgva samskifti við lærarafelagið, kommunufeløgini, ráðgevar og eftirskúlamyndugleikar viðgjørt spurningin um hvønn næmingaaldur fyrsti føroyski eftirskúlin eigur at leggja dent á at rúma.

Í elsta álitinum, dagfest desember 1990, verður mælt til, at eftirskúlin er fyri 8., 9. og 10. floks næmingar.[24] Eitt sjónarmið, sum valla kundi vera øðrvísi tá, vegna tess, at arbeiðsbólkurin var fullkomiliga bundin av fólkaskúlalógini, tí at eingin lóg var um eftirskúlar. Av somu grund mælir álitið frá 1990 eisini til, at eftirskúlin eigur at skipast "innan karmarnar í fólkaskúlalógini". [25]

Fyrimunir og vansar eru við øllum, men eftirskúlanevndin er á einum máli um, at eftirskúlin eigur at vera fyri næmingar í 10. floks aldri, t.e. fyri næmingar, sum eru vorðnir leysir av tvungnum skúlagangi. Hesin aldursbólkur gevur eftirskúlanum størri frælsi til at undirvísa, eins og tað serliga eru ungdómar í hesum aldursbólki, sum hava so stóran tørv á einum øðrvísi skúlatilboði, sum í føroyskum skúlahøpi brýtur burtur úr nýggjum.

Eingin ivi er um, at eftirskúlin lýkur ein tørv í einum tómrúmi í føroyskum skúlahøpi. Sannroynd er, at nógvir føroyskir ungdómar ikki tíma at ganga í 10. flokki, og at nógvir, sum byrja 10. flokk, gevast. Hesir ungdómar, nógvir teirra í hvussu so er, kenna seg ikki tryggar við at fara av landinum á eftirskúla, og er føroyski eftirskúlin sum skraddaraseymaður til slíkar næmingar. Alternativið er mangan tómgongd og ein óvirkin gerandisdagur hjá hópinum av ungdómi her á landi, bæði gentum og dreingjum, men serliga hava tað verið dreingirnir[26], sum hava havt lyndi til at dragna afturúr.

Hugsast kann eisini, at nógvir næmingar fara á miðnámsskúla, sum ikki eru búnir til tess, næmingar, sum høvdu havt sera gott av einum mennandi ári á eftirskúla.

Ein eftirskúli fyri 10. floks næmingar hevur møguleikan at bjóða seg fram við eini alternativari undirvísing, sum vanligi fólkaskúlin ikki hevur.

[24] Álitið 1990, p. 3

[25] Ditto, p. 10-11

[26] Gongdin hevur leingi verið tann, at genturnar fara víðari í útbúgvingarhøpi, meðan dreingirnir mangan dragna frá.

Endamál, námsfrøði, umhvørvi og trivnaður.

Nógvir raskir og dugnaligir næmingar hava rent seg fastar í vanliga fólkaskúlanum og í gerandisdegnum, og hava tørv á nýggjum og øðrvísi avbjóðingum. Hetta er galdandi fyri bæði gentur og dreingir, og skal eftirskúlin verða eitt livandi og skapandi umhvørvi, sum eggjar ungdóminum til mennandi virksemi.

Eftirskúlanevndin og fyrireikararnir hava líka síðan verkætlanin fór av bakkastokki í 2000 staðfest, at ovurstórvur tørvur er á einum skúla, sum á einum skapandi, kreativum grundvølli lærir næmingarnar at virðismeta egnar dygdir og kveikir forvitni eftir vitan og kunnleika.

Námsfrøðiligi grundvøllur eftirskúlans er at taka støði í einstaka næminginum, og at gera næmingarnar medvitandi, sjálvstøðugar, ábyrgdarfullar og sosialar.[27]

Eftirskúlin leggur dent á teir góðu eginleikarnar hjá tí einstaka næminginum, heldur enn veikleikarnar. Næmingur, ið upplivir at egið avrik eydnast væl, fær størri sjálvsálit og sjálvsvirðing. Eftirskúlarnir hava góðar royndir av, at hugurin eftir at nema sær vitan og førleikar mennist tá ið næmingarnir fáa virðing fyri sær sjálvum, eins og sjálvsmenningin vekir ans um ábyrgdarkensluna mótvegis trivnaðinum hjá felagsskapinum.

Næmingarnir eru í einum aldri, har búningin av álvara fer fram og við kreativum fakútboðum fær næmingurin høvið til at fáast við slíkt, sum veruliga hevur persónligan áhuga, tað veri seg tónleikur, drama, filmsgerð, ítróttur, list, handverk, etc.

Samanbygdu lestraríbúðirnar og skúli setir stór krøv til bæði næmingar og lærarar, men er eisini eitt spennandi umhvørvi hjá báðum pørtum.

At skúlin virkar sum heimstaður í frítíðini er eisini ein bókligt styrki. Næmingarnir kunnu saman ella hvør sær fyrireika seg í frítíðini, og soleiðis hjálpa hvørjum øðrum, alt eftir fakligum førleika. Nærveran ger seg eisini galdandi millum lærarar og næmingar á einum eftirskúla, og er hetta við til at skapa serlig pedagogisk viðurskifti.

Tey, sum vilja starvast á einum eftirskúla, er ivaleyst fólk, sum hava áhuga í undirvísing og arbeiði í tí kreativa rúminum, tí at tað er ein serlig avbjóðing at fáast við ungdómar, stundum allan sólaringin, men tað er sjálvandi eisini ein serlig uppliving at hava kensluna av, at gera sítt til, at tann einstaki næmingurin verður loftaður.

Til tess at skapa bestu gróðrarlíkindi fyri, at støðið verður tikið í einstaka næminginum, leggur eftirskúlin stóran dent á, at fakliga útboðið tekur atlit til áhugamálini hjá bæði gentum og dreingjum. [28]

---

[27] Smb. § 3 í lógini um eftirskúlar

[28] Smb. p. (útgreiningin av lærugreinum)

Kanska er undrunarvert, at eftirskúlin er so væl dámdur av ungdómum, tí at flestu eftirskúlar hava skipaðar reglur, eitt nú fastar songartíðir, kravda uppmøting og gerandisskyldur eins og matgerð, reingerð, skúlating o.a. Royndir vísa tó, at nógvum ungdómum dáma lívið í einum felagsskapi við føstum, felags reglum og skyldum, og trívast undir meira skipaðum karmum við ábyrgd fyri sær sjálvum og øðrum, og er hetta ein av høvuðsgrundunum til stóru tilgongdina til eftirskúlarnar.[29]

Næmingarnir eru á skúlanum dag og nátt, so at eftirskúlin virkar ikki bara sum ein skúli, men eisini sum eitt heim í gerandisdegnum. Eitt slíkt umhvørvi við skúla og samanbygdum lestraríbúðum er ein grundleggjandi partur av teimum virðiseyðkennum, sum ein eftirskúli hevur: felagsskapur, kreativitetur, lærdómur, álit, tryggleiki, virðing, forvitni, stuttleiki og umsorgan, virðiseyðkenni, sum síggjast aftur í námsfrøðiliga innihaldinum, har endamálið er at gera næmingarnar persónliga, sosialt, handliga og bókliga medvitandi.

[29] Hetta sjónarmið kom greitt til greinar í samtalu við eftirskúlanæmingar, sum eftirskúlanevndin hitti á kanningarferðini í semtember 2006

## Eftirskúlanæmingar

### Føroyar – útlond

Tíverri finst eingin verulig skráseting av føroyskum næmingum á útlendskum eftirskúlum. Politiski myndugleikin smíðaði í 2000 lógina um eftirskúlar m.a. við teirri grundgeving, at so nógvir føroyskir næmingar fóru av landinum.[30] Í álitinum frá 1990 varð mett, at umleið 50 næmingar árliga fóru av landinum.[31]

10 ár seinni upplýsir Undirvísingar- og Mentamálastýrið, at "fleiri enn 100 næmingar fara árliga á eftirskúla í Danmark."[32]

Álitið, nágreiniligari útgreiningar 2007, miðar seg eftir upplýsingunum hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og eini sjálvstøðugari meting, sum er grundað á námsvitjanir á donskum eftirskúlum og vitjan av eftirskúlaráðgevum í Føroyum.

Taka vit ringastu útlitini er framvegis brúk fyri í minsta lagi einum eftirskúla í Føroyum. Halda vit okkum til varisligar metingar er brúk fyri 2-3 føroyskum eftirskúlum.[33]

Ikki er nøkur tilvild, at eftirskúlanevndin vil hava ein framúr góðan eftirskúla í Føroyum, við einum víðfevndum útboði av møguleikum, sam vit vita av drúgvum royndum aðrastaðir dregur ungdómin.

Í Danmark eru á leið 260 eftirskúlar. Hørð kapping er um næmingarnar, eisini føroyskar næmingar, og er eftirskúlin í dag millum best dámdu útbúgvingartilboð hjá ungdóminum.

Á hvørjum ári eru umboð fyri danskar eftirskúlar umkring í Føroyum, at "selja" sínar skúlar til føroyskan ungdóm og føroysk foreldur. Føroyski eftirskúlin skal skara framúr, tí at hann skal standa seg í kappingini við aðrar eftirskúlar.

Ein rímulig meting halda vit er, at næmingar vilja altíð vera, sum heldur ynskja at sleppa í útlond á eftirskúla[34], men at hetta tal javnvigast av næmingum, sum ikki vilja fara av landinum.

---

[30] Undirvisingar- og Mentamálastýrið (Umms.) j. nr. 10121/000181/2/SE, 01.03.00, p. 5

[31] Álit desember 1990, p. 3

[32] Undirvisingar- og Mentamálastýrið (Umms.) j. nr. 10121/000181/2/SE, 01.03.00, p. 5, 6

[33] Álit. Útgreiningar, 2007, talvuyvirlitið aftast.

[34] Summir næmingar vilja sleppa á ein eftirskúla, sum bjóðar seg fram við so serstøkum sergreinum, at aðrir eftirskúlar ikki eru relevantir.

Eftirskúlanevndin vil eisini staðiliga minna á, at í øllum tosinum um eftirskúla í Føroyum verður alt ov ofta ein málbólkur gloymdur, at eftirskúlin so sanniliga eisini er til fyri føroyskan ungdóm, sum býr uttanlands. Hópurin av føroyingum búleikast um allan heim, og als eingin ivi er um, at nógv av hesum foreldrum fegin vlija hava síni børn kjølfest í føroyskum máli og mentan. Her er talan um ein forsømdan málbólk, sum eftirskúlin eigur at leggja stóran dent á at fáa fatur á.

Tað hevur týdning hjá eftirskúlanevndini at vísa á, at ein føroyskur eftirskúli ikki bara er góður fyri samfelagið, tí at hann skapar árvaknar næmingar, men at skúlin eisini er samfelagsgagnligur, tí at hann bæði minkar um fráflytingina av ungdómi, samstundis sum hann er ein gyltur møguleiki til at draga nýggjan ungdóm til Føroyar.

Álitið 31. mai 2007 leggur stóran dent á møguleikan at útveksla næmingar við aðrar eftirskúlar. Víst verður í álitinum á, at "til tess at gera føroyska eftirskúlatilboðið so breitt, dragandi, mennandi og spennandi sum yvirhøvur gjørligt er ætlanin at næmingarnir, tá ið teir fara á "útveksling" á útlendskum eftirskúla, kunnu velja millum eftirskúlar, sum eru kendir fyri sterkan profil á ávísum økjum."[35]

Í álitinum verður eisini ført fram, at "útveksling" av næmingum skapar "eitt altjóða umhvørvi og møguleikar, ið nøkta áhugamálini, forvitni og møguligan útferðarlongsul hjá tí einstaka".[36]

"Ùtveksling" av næmingum er ein møguleiki, sum er verdur at umhugsa, og kundi gjørst ein táttur hjá eftirskúlanum í Suðuroy. Útveksling av næmingum á aðrar eftirskúlar hevur fleiri týðandi fyrimunir:

1. Nakrir næmingar, sum ikki "tíma" at ganga á eftirskúla í Føroyum, høvdu allíkavæl umhugsa møguleikan.

2. Næmingarnir kunnu velja millum eftirskúlar, sum hava sterkan profil á ávísum økjum, alt eftir áhugmálum.

3. Eftirskúlin fær ein altjóða profil, og verður tann einasti millum eftirskúlarnar, sum bjóðar seg fram við møguleikanum at útveksla næmingar.

Vansar eru tó við einum býti av næmingum, ikki minst hvussu útvekslingin skal skipast, og hvussu gjaldsskipanin skal vera. Harumframt eru sera ymiskar stuðulsskipanir galdandi í Danmark og Føroyum, so at umbýtið av næmingum kann gerast meira møði enn føði.

Møguleikin at útveksla næmingar er sostatt ein spurningur til umrøðu, og eigur ikki at vera avgerandi fyri stovnsetan av eftirskúlanum. Tann møguleikin er eisini opin, at føroyski eftirskúlin og ein útlendskur eftirskúli finna eitt felags stev í einum umbýti av næmingum. Í slíkum føri eigur tað at vera upp til skúlaleiðsluna at taka avgerðina, sjálvandi við atliti til fíggjarligu karmarnar, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi.

*

[35] p. 3

[36] p. 3

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Staðseting og skúlabygningurin

Staðsetingin í Suðuroy samsvarar við politiska myndugleikan; løgtingið hevur einmælt tikið undir við uppskoti til samtyktar um eftirskúla í Suðuroy[37], og flest allar kommunur í landinum hava tikið undir við, at eftirskúlin eigur at liggja í Suðuroy, so hjá eftirskúlanevndini er einki ivamál um henda spurning.

Ein staðseting, sum ikki er partur av einum stórbýarmeldri, samsvarar við øll trý undanfarnu álitini og við ráðini frá útlendskum eftirskúlamyndugleikum. Suðuroyggin er leys frá hinum oyggjunum, og er sostatt eitt serstakt samfelag, við eini náttúrugivnari fjarstøðu til stórbýarlívið, men samstundis er Suðuroyggin í vavi og fólkatali so mikið stór, at hon hevur alt, sum hoyrir einum nútímans samfelag til.

Nevndin leggur stóran dent á, at "selja" náttúruna sum eitt tilfeingi, ið eftirskúlin eigur at gagnnýta og brúka í upplivingarhøpi. Her verður hugsað bæði um tað, sum náttúran gevur til húsarhaldið á skúlanum, og um vakurleikan, náttúrunar dragandi megi, útiítrótt, gongutúrar, tjaldtúrar, fuglalív, tað maritima umhvørvið, sum eisini er partur av profilinum hjá skúlanum, fletting, og í heila tikið tað bygdarlív, sum er merkt av náttúruni, etc.

Sjálvandi mugu stór atlit takast til fíggjarliga partin tá ið ræður um staðseting og sjálvan skúlabygningin. Fleiri møguleikar hava verið uppi at venda, bæði hvar skúlin skal liggja og hvørt talan skal vera um nýbygging ella um at yvirtaka ein gamlan skúlabygning.

Uttan at fara í smálutir við ítøkiligum skúlum, sum hava verið uppá tal, kann upplýsast, at nevndin hevur spurt seg fyri hjá nøkrum kommunum um møguleikan fyri at yvirtaka brúktar skúlar.[38]

Eftirskúlanevndin er ikki í iva um, at rættast er at byggja nýggjan skúla til endamálið, bæði av námsfrøðiligum og fíggjarligum grundum. At umbyggja ein gamlan skúla kostar straks nógvan pening, tí at fyrst skal skúlin keypast, tínæst krevst altíð onkur umbygging og loksins skulu lestraríbúðirnar byggjast, eins og ein skúli, sum ikki er gjørdur til endamálið ikki hevur somu møguleikar at liva upp til námsfrøðiligu krøvini, uttan so, at stórar upphæddir verða nýttar til endamálið.

Greitt er, at fíggjarligu atlitini altíð viga sera nógv, og hevur nevndin kannað ymiskar møguleikar í sambandi við nýbygging. Íløguprísir og rakstrartøl fyri skúlabygging til 40, 60 og 80 næmingar eru kannað og samanborin. Samanberingin vísir, at tað, sum ein sparir í íløgum við at minka um bygningin kostar dýrt í hinum endanum, á rakstrarsíðuni.

Full semja er í nevndini um, at leggja dent á so skynsaman rakstur sum gjørligt, og at neyðugt er at hugsa framskygd, og at ein eftirskúli til 80 næmingar er rætta loysnin. Ikki minst við teimum prísum, sum liggja á borðinum í løtuni.

---

37 Samtykt við 26 atkvøðum fyri og ongari ímóti, 19. nov. 2009

38 Einans tvær kommunur í Suðuroy høvdu bygningar at vísa á, við teimum sjálvsøgdu treytum, at skúlarnir vórðu keyptir.

Nevndin kann staðfesta, at nýggjur skúli, sum er gjørdur til endamálið at virka sum eftirskúli, og sum hevur búpláss til 80 næmingar, fæst í dag fyri í mesta lagi 50 mió. kr., íroknað lendisarbeiði, sjóhita, kreativ rúm, inventar, etc.

Fermetraprísurin liggur um kr. 8.000,- Hesum prísi kann eingin endurbygging av verandi skúlum kappast ímóti fíggjarliga.

Tað liggur í kortunum, at nýggi eftirskúlin verður staðsettur á Drelnesi, beint vestan fyri SALT. Tvøroyrar kommunar heimilar nevndini økið til bygging av eftirskúla, eins og kommunan hevur samtykt, at komandi eftirskúlin fær gamla bygningin á Hvítanesi til at brúka sum marinu og skúlaverkstað.[39]

Ein staðseting á Drelnesi hevur stórar fíggjarligar og námsfrøðiligar fyrimunir, ið standast av samstarvi millum eftirskúlan og SALT. Við slíkum samstarvi kunnu næmingar og lærarar dúva uppá karmar, umstøður og fasilitetir, sum fáir, ella kanska eingin annar eftirskúli megnar at bjóða fram, tá ið tað snýr seg um kreativa útboðið hjá einum eftirskúla.

Í ítrótti eru bestu umstøður við høll og nýggjum fótbóltsvølli í Trungisvági, og í Vági er einasti langhylur í Føroyum, ein svimjihøll, sum í roynd og veru er ein vælferðardepil, útgjørdur við alskyns, nútímans vælferðar fasilitetum, eins og dampbað, gosbað, hittapottum, etc.

Fíggjarligu fyrimunirnir av at staðseta skúlan á økinum vestan fyri SALT eru eisini ásýniligir. Við at lata skúlan byggja á føstum lendi spara vit umleið 7 mió. kr. í lendisarbeiði. Harumframt eru ogninar á Drelnesi og Hvítanesi at rokna sum eitt byrjunarfæ hjá eftirskúlanum, eins og bygningurin á Hvítanesi sparir eftirskúlanum fyri stórum íløgum í verkstaði og hølum, sum skulu nýtast í sambandi við maritima virksemið og handverkaravirksemi.

Nærmasti grannin, SALT, ger, at eftirskúlin fær forerandi høli, sum eru skraddaraseymað til drama & teatur, tónleik, list, etc.

Samanumtikið eigur eftirskúlin í Suðuroy at vera "second to none" samanborin við aðrar. Eftirskúlin skal skipast á so góðum grundvølli, at næmingarnir verða stoltir av honum; kenna seg virdar, mentar, sjálvstøðugar og ikki minst medvitandi um týdningin av einum væl virkandi felagsskapi. Saman við SALT, Hvítanesi og ítróttarfasilitetunum í Trungisvági eru kringumstøðurnar á Drelnesi optimalar fyri ein eftirskúla. Og tá er ikki at gloyma sjálvan Trungisvágsfjørð, sum er sera væl egnaður til upplæring í góðum sjómansskapi, og til annað virksemi á sjónum.

Skúlin rúmar 80 eftirskúlanæmingum, sum allir búgva á dupultkømurum. Talan er sostatt um 40 dupultkømur, sum øll hava brúsu og wc.

Um skúlabygningin er m.a. at siga, at sera umráðandi er, at næmingar kenna seg heima, og tí eru skúli og heimstaðurin ein eind. Kømurini eru av slíkari góðsku, at skúlin kann brúkast sum hotel um summarið.

Skúlin er gjørdur so heimligur sum gjørligt. Á skúlanum er køkur, eitt hugnaligt alrúm miðskips og serstøk matstova. Á skúlanum eru eisini nøkur sniðpláss, sum eru væl egnað hjá

[39] Grundstykkið verður latið ókeypis, eins og bygningurin á Hvitanesi (har Pól Hansen, heilsøla, helt til) verður latin uttan kostnað. Træbrúgvin verður eisini latin eftirskúlanum, og hevur skúlin ábyrgdina av at halda hana við líka.

næmingunum at seta seg saman og gera skúlating, ella á annan hátt at hugna sær ella samskifta, alt til tess at skapa so góðan gróðrarbotn undir felagsskapinum sum gjørligt.

Við teimum fasilitetum, sum SALT hevur at bjóða eftirskúlanum, er talan um eitt potentiali, sum fáum eftirskúlum er unt. Eftirskúlin, SALT og alt økið umkring verður ein mentanarlig perla[40], sum uttan iva fer at virka dragandi uppá almenningin.[41]

[40] Alstórur dentur er lagdur á, at eftirskúlabygningarnir, SALT og økið á Drelnesi virka sum ein arkitektonisk eind, við trivnaði fyri eygað, og soleiðis, at bæði útlendingar og føroyingar taka hetta plássið til sín.

[41] Í ferðavinnuhøpi er tað ein sannroynd, at størsti bágin í Suðuroynni er væntandi vistveitingarmøguleikar. Tað er ógjørligt at útvega innivist til nógv ferðafólk. Ein staðseting av eftirskúlanum á Drelnesi ella í Líðini er sostatt ein "vinn vinn støða" soleiðis at allir partar hava fyrimunin av staðsetingini.

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Ein gjøllig tørvslýsing av einum eftirskúlatilboði

Eftir boðum frá mentamálaráðnum gjørdi arbeiðsbólkurin til frama fyri eftirskúla í Suðuroy í síni tíð eina tørvslýsing.[42] Henda tørvslýsing er grundað á samanbering av donskum og føroyskum hagtølum. Taka vit daprasta úrslitið, har tilgongdin til eftirskúla í Føroyum er mett nógv lægri enn í Danmark, sum hevur drúgva og ríka eftirskúlasiðvenju, fáa vit eitt tal, ið samsvarar við eftirskúlaverkætlanina í Suðuroy, nevniliga 70 – 80 næmingar.[43]

Hetta er ein ógvuliga døpur meting, tí at hóast danir hava eina langa eftirskúlasiðvenju, so er tað ein avmarkaður sannleiki, at føroyingar onga eftirskúlasiðvenju hava. At eitt stórt tal av ungdóminum fer av landinum á eftirskúlar eru hvørki leikfólk ella politikarar óvitandi um.

Nevndin hevur í nógv ár mett, at á leið 120 føroyskir næmingar hvørt ár, leita sær til Danmarkar á danskar eftirskúlar. Hetta er eitt tal, sum samsvarar nøkulunda við metingina hjá Mentamálaráðnum, sum upplýsir, at "fleiri enn 100 næmingar fara árliga á eftirskúla í Danmark."[44]

Avgerandi fyri eina tørvslýsing av einum eftirskúlatiboði er, hvat tað er fyri ein eftirskúli, sum vit tosa um. Soleiðis er tað sjálvandi ikki bert í Føroyum, men eisini aðrastaðir. Ymiskt er hvussu eftirskúlar eru í dygd og vavi og hvussu fakligu tilboðini síggja út. Teir góðu eftirskúlarnir hava gott orð á sær, og bíðitíðin er eini 3 - 4 ár. Er talan um ein eftirskúla við einum smølum eftirskúlatilboði eru tað bara ávísir næmingar við einum ávísum áhuga sum vilja søkja inná slíkan eftirskúla. Er talan um eftirskúla, sum ikki hevur gott orð á sær, er eftirspurningurin sjálvandi hareftir. Sera áhugavert er eisini at eygleiða gongdina í Danmark, har árgangurin av ungdómi í eftirskúlaaldri hevur verið støðugt minkandi seinastu nógvu árini samstundis sum tilgongdin til eftirskúlarnar bara økist.[45]

Hóast talið av ungum í Danmark er fallið úr 340.000 seinast í sjeytiárunum niður í móti 200.000 í 1999, er talið av eftirskúlum hesi somu ár vaksið úr gott og væl 100 til á leið 260.[46] Somu ár er talið av eftirskúlanæmingum økt úr á leið 6.000 til á leið 24.000.[47]

Donsku tølini siga alt um, hví nevndin heldur at tað hevur sínar góðu grundir, at vit vilja hava ein framúr góðan eftirskúla í Føroyum. Tað kann ikki sigast nóg ofta, at eftirskúlin í Føroyum skal skara framúr, tí at vit eru í støðugari kapping við danskar eftirskúlar um næmingarnar.

Hálvum loysnum er eingin dugur í, og nevndin leggur dent á, at til tess at røkka so góðum úrsliti sum gjørligt hava stigtakararnir, kommununalu myndugleikararnir, lærarafelagið og

---

[42] Bræv frá mentamálaráðnum, dagfest 31. maj 2007

[43] Skjal 1 aftast í álitinum

[44] Smb. notu 32

[45] Smb. Skjal 2 aftast í álitinum.

[46] Smb. talvu 2 og talvu 3, p. 22 og p. 24

[47] Talva 3, p. 26

skúlaleiðarafelgið tikið seg saman í strembanini eftir at fáa reist tann góða eftirskúlan, sum føroyski ungdómurin hevur uppiborið.

Í sama viðfangi kann nevnast, at arbeiðið við at skipa eftirskúla í Føroyum í nógv ár hevur fingið jaliga umrøðu í donskum eftirskúlaumhvørvi, so mikið jaliga, at grønlendingar vendu sær til stigtakararnar um ráð í sambandi við ætlan um at skipa eftirskúla í Grønlandi, tí at myndugleikar og foreldur harmaðust um, at grønlendski ungdómurin noyddist av landinum. Í dag eru fleiri eftirskúlar í Grønlandi, meðan vit enn stríðast fyri at fáa okkara fyrsta skúla á stovn.[48]

[48] Fyrsti grønlendski eftirskúlin í Qasigiannguit brjaði sítt virksemi í august 2009. Eftirskúlin er gjørdur til 80 næmingar, sum í aldri eru leysir av fólkaskúlanum. Longu árið eftir søktu 160 næmingar á henda eftirskúlan, og næsti eftirskúlin, Maniitsoq eftirskúlin, sá dagsins ljós.

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Ískoyti - Næmingar og skúli

Í tosinum um eftirskúlanæmingar mugu vit rokna við, at talan er um ein søkjandi, men samstundis viðbreknan aldur og vit vita av royndum, at av føroyskum næmingum, sum fara á danskar eftirskúlar, eru altíð nakrir, sum av longsli venda heim aftur eftir stutta tíð.

Royndir aðrastaðni vísa eisini, at tað er breiður skari av næmingum, sum ganga á eftirskúla, ein skari, sum umboðar allar samfelagsbólkar. Í hesum viðfangi skal skoytast uppí, at í Danmark og í Grønlandi virkar ein stuðulsskipan í sambandi við eftirskúlarnar, soleiðis at tey, ið eru verri ella illa fyri fíggjarliga fáa styrk til at rinda fyri uppihaldið. Ein skipan, sum borgar fyri, at øll, ið hava hug og áhuga, sleppa á eftirskúla.

Sum longu nevnt er útveksling av næmingum ein møguleiki hjá eftirskúlanum í Suðuroy. Fyrimunir og vansar eru við eini slíkar skipan; útvekslingin vil skapa eina sterkan og serstakan profil, tí at eingin annar skúli hevur slíka skipan, men vansarnir eru eyðsýndir, ikki minst, hvussu fíggingin skal skipast.

Annar møguleiki er, at eftirskúlin í Suðuroy í hvørjum skúlaári ger eina námsferð, møguliga saman við einum donskum eftirskúla, soleiðis at báðir skúlarnir í felag arbeiða við eini og somu verkætlan, sum verður realiserað á námsferðini. Hetta er ein spennandi møguleiki, sum eisini kann draga skúlanæmingar í øðrum londum inní verkætlanina. Nevndin leggur dent á, at hetta eru møguleikar, men ikki nøkur fastløgd ætlan.

Greitt er, at slíkt skúlatilboð gevur eftirskúlanum í Suðuroy ein serstakliga sterkan og øðrvísi profil, og fer at lofta nøkrum næmingum, sum annars aftra seg við at ganga á eftirskúla í Føroyum. Samstundis eigur kjølfestið skúlans í føroyskum máli, mentan og upplivingum at borga fyri, at føroyskir ungdómar, sum búgva uttanlands, fegnir vilja til Føroyar at ganga á eftirskúla.

Av royndum vita vit eisini, at nakrar lærugreinar appelera til bæði kynini, meðan aðrar lærugreinar hava lyndi til at eggja dreingjunum til, og onnur fak virka meira dragandi á genturnar.

Tann fyrsti føroyski eftirskúlin kann ikki leggja seg á bara eina linju, tí at so máa vit støðið undan skúlanum beinanvegin. Gera vit ein skúla, sum bara er maritimur ella bara fæst við ítrótt, so útihýsa vit straks teimum næmingum, sum hava heilt onnur áhugamál.

Neyðugt er at fevna so mikið víða, at vit tosa um ein fakliga blandaðan og kreativan eftirskúla. Til samanberingar kann sigast, at nakrir eftirskúlar eru meira breiðir, aðrir bjóða seg fram við færri tilboðum, meðan onkur skúli bara bjóðar seg fram við einari høvuðslinju. Slíkar "nichur" vilja altíð vera dragandi fyri nakrar næmingar, men føroyski eftirskúlin má og skal laga seg til ta sannroynd, at fólkagrundarlagið er sum tað er.

Sigast skal í hesum sambandi, at nógvir eftirskúlar, sum bjóða seg fram við breiðum útboði, eru sera væl dámdir.

Øll hesi ár, sum nevndin hevur virkað, hevur tætt samstarv verið við kommunurnar í Føroyum. Nógvar kommunur hava størsta áhugan í at lofta næmingum, sum av eini ella aðrari grund hava rent seg fastar, við at veita teimum alternativan møguleika á einum føroyskum eftirskúla.

Taka vit ein miðal gjøgnumskurð av talvuni í skjali 1, er næmingargrundarlag fyri tveimum – trimum eftirskúlum í Føroyum. Halda vit okkum til tey daprastu útlitini er framvegis nóg mikið av næmingum til eftirskúlan í Suðuroy, tí tað skortar ikki uppá føroyskar ungdómar, sum hungra eftir avbjóðingum, fyri ikki at siga ábyrgdarfullum innihaldi í lívinum. Taka vit atlit til skjal 2, sum vísir eina ovurstóra øking av tilgongdini til eftirskúlarnar í Danmark, er eingin grund til at halda, at sami tendensur ikki ger seg galdandi í Føroyum. Bara spell og kostnaðarmikið, at einastu eftirskúlatilboð til føroyskan ungdóm eru uttanfyri landoddanar.

Eftirsum tølini yvir talið av næmingum á donskum eftirskúlum í skjalayvirlitinum aftast í álitinum visa gongdina til 2011 skal upplýsast, at økta tilgongdin av eftirskúlanæmingum hevur staðið við. 2014/15 var talið av næmingum, sum gingu á eftirskúla 28.113 og er tað ein øking uppá 710 næmingar ella 2.6% samanborið við 2012/13.[49]

[49] Efterskolerne 10.10 2014, p. 1

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Námsfrøðiliga innihaldið í eftirskúlatilboðnum

Lærugreinar og gerandisdagur

Fremsta uppgávan hjá eftirskúlanum er at lofta næminginum, har viðkomandi er staddur, at stimbra næmingin í búningini, til at virða seg sjálvan og felagsskapin.

Tankin er at samantvinna siðbundnar, kravdar lærugreinar og kreativar lærugreinar, sum vanliga liggja uttanfyri tey tilboð, sum fólkaskúlin kann bjóða, smb. eftirskúlalógina § 5, stk. 2, nr. 1 og 2. Tað er júst henda samantvinning, sum fakliga ger eftirskúlan til ein eftirskúla.

Tá ið ræður um undirvísing, ið umfatar kravdar lærugreinar, heldur eftirskúlin seg til fólkaskúlalógina. Meira ella annað heldur eftirskúlanevndin seg ikki hava heimild ella myndugleika at siga um henda partin av frálæruni.

Yvirlit yvir kreativar lærugreinar:

Verkstaður:
1. Træ
2. Jarn, plátur
3. Motorar
4. Glas

Maritim innlæring

Media (filmsgerð)

KT - forritan

Foto

Drama/teatur

Tónleikur/sangur

Dansur

Studio

Myndlist/listasøga

Ítróttur – (úti- og inniítróttur)

Svimjing/Kaving

Vælvera/heilsufremjan

Seyming/hondarbeiði/sniðgáva (design)

Illustratiónir/tekning/skulptur/3D verkstað

Greitt er, at við slíkum úrvali umboðar eftirskúlin sera umfatandi skapandi áhugamál. Í fleiri førum umskarast áhugamálini, og tað er bara ein fyrimunur, tí at næmingarnir styrkja um hvør annan, eins og lærararnir hava fyrimunin av tvørfakligari undirvísing.

Fægstu av hesum kreativu tilboðum krevja nærri útgreiningar.[50] Tó skal fyri ordans sakir viðmerkjast, at t.d. tilboðið um at læra at kava ikki verður gjørt uppá kvamsvís, men undir tryggum umstøðum, og at foreldrini undir øllum umstøðum góðkenna, at teirra næmingur tekur lut í hesi undirvísing.

Vit hava nevnt forritan sum ein møguleika. Telduheimurin fyllir ómetaliga nógv hjá ungdóminum, og nevndin heldur, at tað er týdningarmikið at skúlin hevur eina nútímans tilgongd til tann veruleika, sum ungdómurin livir og virkar í. Tí halda vit tað vera eitt gott hugskot, at næmingarnir kunnu læra at gera forrit, tí tað er eitt av aðalendamálunum hjá skúlanum at gera næmingarnir medvitandi um tað, sum teir fáast við.

Eftirskúlanum stendur sera frítt at skipa undirvísingina í kreativu lærugreinunum, men nevndin heldur, at tað er gagnligt fyri næmingin, læraran og skúlan, at alternativa undirvísingin eisini miðar eftir ítøkiligum úrslitum.

Eftirskúlin er so væl útgjørdur við verkstaði, maritimum fasilitetum og kreativum rúmum, at hann er sera væl egnaður til projekt- ella verkætlanarundirvísing í alskyns greinum. T.d. handverkaraverkætlanir, framleiðsluverkætlanir, kvøldsetuverkætlanir, etc.

Handverkaraverkætlan kann vera umvælingar av ymiskum slagi í skúlabygninginum. Slík verkætlan kann umfata planlegging, tilfarsútrokning, keyp, roknskap, o.a.

Dømi um framleiðsluverkætlan er eitt nú góðskuframleiðsla av onkrum fiskaslagi, tara ella landbúnaðarvøru. Her kunnu næmingarnir læra um virkisbúskap, lívfrøði, vistfrøði, o.a.

Kvøldsetuverkætlan: Nøkur útvald vikuskifti skipa næmingarnir fyri kvøldsetu til gaman og álvara fyri skúlanum og lokalsamfelagnum. Næmingarnir læra seg at framføra, lesa upp og kanska at skriva søgur, sjónleikir, yrkingar og tónleik.[51]

Skeið í ávísum lærugreinum og disiplinum er eisini ein møguleiki, t.d. kann hugsast, at ávísir næmingar hava serligan áhuga í stavseting, aðrir í prosentrokning ella týskum, etc, etc.

Eftirskúlin skal, sum so ofta sagt í hesum áliti, strimbra næmingarnar, eisini tá ið tað snýr seg um at endurvekja áhugan fyri tí bókliga hjá gentum og dreingum, sum hava mist skúlahugan.

Einki er so týdningarmikið fyri ein skúla sum innihaldið. Innihaldið á eftirskúlanum eigur at vera soleiðis, at næmingarnir kenna seg upplyftar, virdar og væl. Eftirskúlauppihaldið skal

vera ein íblástur sum ber restina av lívinum, eisini íblástur til at nema sær bókligar førleikar hóast tað av eini ella aðrari grund sær svart út við áhuganum hjá tí einstaka næminginum.

50 Næmingarnir verða sjálvandi væl og virðiliga kunnaðir um lærugreinarnar, undirvísingina og ymisku tilboðini, tá ið skúlin er vorðin veruleiki.

51 smb. Álit 1990, p. 15

Sjálvandi umskarast áhugamálini hjá báðum kynum viðhvørt, men áhugamál eru eisini, sum liggja meiri til gentur enn dreingir og øvugt.

Eftirskúlin í Suðuroy er reistur á tí innihaldsliga grundvølli, at lærugreinarnar og tilboðini appellera til bæði gentur og dreingir. Hetta er av stórum týdningi, tí at tað er umvegis kreativa virksemið at ansurin fyri bókligum áhugamálum verður endurvaktur ella vaktur.[52] Næmingurin skal kenna seg inspireraðan til at kasta seg yvir uppgávur, sum krevja sjálvsálit og konsentratión. Um slíkur íblástur hendir á verkstaðnum millum gamlar bilar ella í seymirúminum millum pløgg og kjak um sniðgávu ella úti í eini filmsupptøku er líkamikið. Altavgerandi er, at íblásturin er til staðar og skapar eina uppliving av sjálvsáliti, búning og árræði.[53]

Somuleiðis eigur eftirskúlin at vera eitt serstakt og kreativt umhvørvi hjá lærarunum, soleiðis at eftirskúlin eisini kann gerast ein íblástur hjá fólkaskúlanum.

Samanumtikið er eisini týdningarmikið at siga um innihaldsliga partin, at nevndu kreativu lærugreinar eru leiðbeinandi. Skúlaleiðslan kann skipa aðrar lærugreinar, bara fíggjarkarmarnir halda.

Eftirskúlanevndin mælir til, at ein arbeiðsbólkur, námsbólkur, verður settur at gera nærri útgreiningar av innihaldsliga partinum av skúlanum, eitt nú at viðgera spurningin í hvønn mun skúlin eigur at vera próvgevandi.

[52] Smb. p. 7 og 8

[53] Sambært kanning svara 79 % av donskum foreldrum, sum hava børn á eftirskúla, at tey ungu hava brúk fyri einum skúlaári, sum ger tey fakliga, sosialt og persónliga avklárað og búgvin til at velja sær útbúgving. (Heimasíðan hjá Efterskoleforeningen).

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Musisk fak

Umskaringin millum menniskju og list er grundleggjandi fyri eftirskúlan, tí at nevndin metir, at listin hevur avgerandi týdning fyri menningina og skapanarevnini hjá menniskjum. Listin er tað málið, sum umfatar alt tað óítøkiliga, sum lívið er so fult av, tey brigdi, sum ikki beinleiðis lata seg siga og grípa. Listin er staðsett onkustaðni millum vit og kenslur, tað rationella og órationella. Listin setir spurningar og opnar dyrnar til kreativu evnini hjá næmingunum.

Av somu grundum bjóðar eftirtskúlin fram nútímans listagreinar, sum kunnu geva íblástur, avbjóðingar og provokation. Royndir frá øðrum eftirskúlun vísa, at næmingar læra at taka støðu um teir dagliga fáast við listarlig evni. Hjá nógvum næmingum, sum sleppa at royna seg í list og kreativum virksemi hendir ein broyting, sum vendir skúlamøini til skúlagleði.

Eftirskúlin í Suðuroy hevur umstøður og høli til musiskar lærugreinir, eitt nú drama, tónleik, sang, myndlist, tekstil, sniðgávu, dans, etc. Hetta eru skapandi lærugreinar, t.e. at næmingarnir hava møguleikan at spæla og sansa, royna mørk av í skapandi tilgongd. Næmingarnir menna sínar førleikar og uppliva gleðina av góðum úrslitum, sum eru partar av teirra egnu persónligheit. Tá ið tað eydnast best kunnu næmingar hava kensluna av at gloyma seg sjálvar í skapandi virksemi, og tað er kanska í veruleikanum har, ein er mest seg sjálvan.

Mongu tilboð eftirskúlans geva næmingunum møguleikan at snodda til ymiskar kreativar lærugreinir. Royndir vísa, at næmingarnir eru skjótir at finna útav, hvar teirra styrki liggur. Høga støðið á verkstøðunum og undirvísingini gevur næmingunum møguleikan at fara í dýpdina.

Fyrimunurin við eftirskúlanum er, at góðu verkstaðirnir eisini geva næmingunum møguleikan til sjálvstøðugt ella felags arbeiði/ítriv í frítíðini.[54]

*

[54] Smb. 2007 Álitið, p. 9-10

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

## Ítróttur og náttúra

Ítrótturin hevur fyrst og fremst seg sjálvan sum endamál, eins og spælið hevur havt tað í alskyns mentanum. Eftirskúlin hevur atgeingi til bæði stóra høll og nýggjan fótbóltsvøll og hevur sostatt tær fyritreytir, ið krevjast til tess at rúma teir partar av tilveruni, sum ítrótturin er so serstakliga væl egnaður til, nevniliga spælið, kappingina og stríðið. Tað spæl, ta kapping og tað stríð, sum fáa okkum at gloyma okkum sjálv, og sum gera okkum til part av einum liði. Tað er í hesum samanhangi, at arbeiðið við kropsligu, sálarligu og sosialu menningini hjá næmingunum ger seg galdandi.

Ítrótturin á eftirskúlanum hevur eisini eitt kreativt, handverksligt endamál. Næmingarnir kunnu smíða sínar egnu kajakkir og bæði uppliva gleðina yvir egin verk og náttúruna frá einum øðrvísi sjónarhorni. At sigla kapp í kajakkum ein sjálvur hevur smíðað er sjálvsagt eitt serstakt upplivilsi.

Eftirskúlanevndin leggur stóran dent á at profilera eftirskúlan við atliti at teirri ótrúliga vøkru náttúruni, sum okkum er givin frá skaparans hond. Mangan taka vit føroyingar hesa einastandandi náttúru so nógv fyri givið, at vit hava lyndi til ikki at síggja virði í henni. Frá donskum eftirskúlum vita vit, at føroyska náttúran, havið og fjøllini, er eitt aktiv sum føroyski eftirskúlin hevur framum aðrar eftirskúlar, og tað eiga vit sjálvandi at gagnnýta.

*

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Tað húsliga

Næmingarnir gera mat, gera reint og loysa aðrar praktiskar uppgávur á skúlanum í samstarvi við køks- og reingerðarfólkini. Eftirskúlanevndin metir tað hava alstóran týdning, at hasar uppgávur eru ein náturligur partur av gerandisdegi eftirskúlans, tí at næmingarnir fáa eina kenslu av týdninginum av gerandisligum endurtøkum, hóast hesar endurtøkur ikki altíð eru tær mest spennandi. Avgerandi er, at næmingar á henda hátt læra at arbeiða og læra at virða arbeiðið hjá øðrum menniskjum. Við sjálvir at arbeiða og hava ábyrgdina av praktiskum uppgávum læra næmingarnir eisini at fáa ans fyri sunnum mati og rávørum – ein vitan, sum teir seinni fáa nýtslu av.

Arbeiðsuppgávurnar fara fram á tann hátt, at næmingarnir verða býttir uppí køksbólkar, seks í hvørjum. Hvør bólkur hevur vakt eina viku í senn. Meðan bólkurin er í køkinum tekur hann ikki lut í vanligu undirvísingini. Hetta arbeiðsbýti verður til á leið tvær heilar vikur, eitt skúlavikuskifti og nakrar einstakar dagar í skúlaárinum.

Hvør vika byrjar við einum fundi, sum samtykkir eina matarskrá, umframt at arbeiðsuppgávurnar verða býttar út. Tá ið vikan er av verður ein eftirmeting gjørd. Skipanin við køksbólkum ger sítt stóra til, at máltíðirnar verða ein góð, felags uppliving.

Næmingarnir í køksbólkinum hava eina stóra ábyrgd av, at máltíðirnar verða borðreiddar rættstundis, at maturin er væl gjørdur og pent settur á borðið, umframt at matarsalurin og øll felagsrúm eru heimlig, rein og nosslig.

Allir næmingarnir hava sjálvir ábyrgdina av reingerð í egnum kømurum, og næmingarnir skulu vaska síni egnu klæði.

Ábyrgdin av reingerð, matgerð, rudding tykjast stór og møtimikil uppgáva hjá næmingum, sum heima við hús fáa alt serverað, men eykent fyri eftirskúlarnar er, at tað just er henda ábyrgdin, sum ger at næmingarnir trívast so væl. Tá ið stigtakararnir vóru rundferð og vitjaðu eftirskúlar og eftirskúlamyndugleikar í Danmark, vórðu næmingar spurdir, hvussu tað ber til, at teir eru so skjótir at virða galdandi reglar á skúlanum. Svarið hjá næmingunum á tí eina skúlanum tók samanum felagsskapskensluna á einum eftirskúla: "Ein næmingur, sum ikki yvirheldur reglarnar, oyðileggur alt fyri hini."[55]

[55] Námsvitjan í Danmark í september mánaða 2006. Næmingarnar, sum her verður sipað til, gingu á Eriksminde Efterskole.

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Gerandisdagurin/felagsskapurin

Dagurin byrjar við morgunsangi. Hereftir hevur skúlin ein felagstíma, sum tvær ferðir um vikuna er ein felags fundur, og tríggjar ferðir um vikuna ein felags uppliving við forteljingum, við luttøku av lærarum og næmingum. Forteljingarnar taka støði í lærugreinunum, verkætlanum, upplivingum og felagsfundirnir eru eitt forum, har stórir og smáir trupulleikar verða umrøddir og mettir. Henda dagsbyrjan hevur stóran týdning fyri eina felags kenslu í gerandisdegi eftirskúlans.

Gerandisdagurin á skúlanum miðar eftir at geva næmingunum ans fyri týdningin av einum demokratiskum samfelagi. Hetta kemur til sjóndar í felagsskapinum, har øll hava somu ábyrgd av at samveran og gerandisdagurin virka á ein góðan hátt. Frælsi, meðábyrgd og ávirkan eru partar av námsfrøðini.

Skúlin eigur at hava eitt sokallað heimastýrið, ið t.d. umfatar 5 næmingar og 2 lærarar, m.a. fyri at stimbra samstarvið millum næmingar og lærarar og fyri at geva íblástur til felags uppgávur í gerandisdegnum. Heimastýrið hevur ábyrgdina av felagsfundunum og hevur ein leiklut í sambandi við at tann einstaki livir upp til sína ábyrgd. Um eitthvørt stingur seg upp, sum krevur nærri viðgerð, kann heimastýrið altíð kalla inn til eyka felagsfundar.

Eyðsæð er, at atferðarmøguleikarnir á einum eftirskúla, har nógv menniskju búleikast saman, ikki eru heilt teir somu sum í eini privatari familju. Tískil hevur eftirskúlin nakrar reglur, sum skulu hjálpa til at fáa samveruna og felagsskapin at eydnast.

Niðanfyristandandi er eitt dømi um, hvussu hesar reglur kunnu vera:

- Næmingarnir taka virknan lut í undirvísingini og møta til tíðina, eisini í sambandi við praktiskt arbeiði og máltíðirnar.
- Alkohol og euforiserandi evni eru strangliga bannað.
- Royking er bannað á skúlans øki.
- Tað er ein mannarættur, at friður skal vera 8 tímar av samdøgrinum, frá kl. 23.00 til kl.

  kl. 07.
- Møtiskylda er til undirvísing og máltíðir.
- Allir næmingar skiftast um at vera heimanæmingar.[56]
- Eftirskúlans reglugerð um nýtslu av talgildum miðlum og tólum skal virðast.

Hesar reglur eru í neyvum samsvari við tað, sum er galdandi fyri teir flestu 260 donsku eftirskúlarnar. Sum sagt, eru reglurnar eitt dømi og endaligu reglurnar eiga at gerast í samráði millum skúlastjóra, skúlastýri, heimastýri og lærarar.

[56] At vera heimanæmingur ber í sær, at næmingurin saman við heimalæraranum hevur ábyrgdina av teimum gerandisligu uppgávum, sum nærri eru ásettar á felagsfundum.

Loksins er at siga um henda partin av álitinum, sum snýr seg um gerandisdagin/felagsskapin, at meginreglan er, at næmingarnir eru á skúlanum um vikuskiftini, og at næmingarnir hava frívikuskifti av og á.

Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Uppskot til møguligar broytingar í lógini um eftirskúlar

Í sambandi við at Føroya Landsstýri í 2007 tók stig til at leggja málið um eftirskúlan fyri løgtingi, fingu eftirskúlanevndin og kommunufeløgini til hoyringar løgtingslóg um eftirskúlar.[57] Tásitandi Landsstýri ásannaði, at neyðugt var við broytingum í lógini, m.a. tí at eftirskúlanevndin staðiliga hevði víst á, at tørvur var á nøkrum dagføringum.[58]

Framvegis er átroðkandi neyðugt at vísa á, at partar av verandi lóg ikki hóska til ein eftirskúla. Henda sannroynd ger seg serliga galdandi í tí partinum av lógini, sum snýr seg um leiðsluviðurskifti, kap. 4 og starvsfólkaviðurskifti, kap. 5.

Sambært verandi lóg er tað skúlastýrið, sum setir lærarar og onnur starvsfólk. Á øðrum eftirskúlum er tað skúlastjórin, sum gevur tilmæli um setan av starvsfólki, tilmæli, sum stýrið síðan tekur støðu til. Eftirskúlin er ein felagsskapur sum skal virka sum ein eind og sum skal liva upp til ávíst sosialt samanspæl millum starvsfólk, og námsfrøðiliga skal skúlin lúka nøkur heilt serstøk og kreativ krøv, so tað er týdningarmikið at stjórin hevur avgerandi orð, táið ræður um at seta tey starvsfólk, sum hann ella hon metir eru tey røttu til at lyfta uppgávuna.

Starvsfólkini eru sjálvandi av vitalum týdningi fyri trivnaðin og innihaldið. Verða fólk sett í starv, sum stjórin ikki metir eru tey best egnaðu ella skikkaðu at røkja uppgávuna, er ovurstórur vandi fyri, at felagsskapinum brotnar og innihaldið verður ótrygt. Aðrir eftirskúlar hava gjørt hesar royndir og tí mælir nevndin til lógarbroyting, smb. skjal 3.

Í verandi lóg, § 16, stendur, at starvsfólk skúlans hava rætt til somu løn sum fólk í samsvarandi størvum í fólkaskúlanum. Í samráði við danskar eftirskúlar og danskar eftirskúlaráðgevar mælir nevndin til ta broyting, at starvsfólk eftirskúlans hava rætt til í minsta lagi somu løn sum lærarar í fólkaskúlanum.

Lærarar á eftirskúlum hava ikki bara undirvísingarskyldu, men eisini skyldu til at vera partur av vaktarskipan og støðugum uppsýni við næmingarnar, eisini í frítíðini. Av somu grundum fáa tey, sum undirvísa á eftirskúlum í minsta lagi viðbót fyri eyka arbeiði, og hesum eigur lógin at hava fyrilit fyri.

Í sambandi við leiðsluviðurskifti, kap. 4, ger eftirskúlanevndin longu í 2006[59] grein fyri hví trupulleikar eru við umboðanini av foreldrum og næmingum í skúlastýrinum. Næmingar eru undir løggildan aldur og skulu, um teir sita í stýrinum, umsita stórar peningaupphæddir. Hví hetta ikki letur seg gera krevur valla nærri útgreiningar.

Viðvíkjandi foreldrum er at siga, at allar flestu næmingar ganga eitt ár á eftirskúla,[60] og tí kenna foreldrini ikki teir næmingar, sum tey skulu umboða í stýrinum. Men sjálvandi eigur eftirskúlin at leggja stóran dent á at samstarva við foreldrini til tess at tryggja, at næmingarnir nema sær

---

57 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirskúlar er dagfest 17. oktober 2007. Fundurin millum Mentamálaráðið, kommunufeløgini og eftirskúlanevndina var 22. oktober 2007.

58 Skjal 3

59 Í AAE álitinum, undir tí partinum sum stendur undir heitinum leiðsla.

60 Undantøkini eru sera, sera fá.

kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini, smb. § 3 í verandi lóg.

Nevndin mælir eisini til ta lógarbroyting, at lærarar ikki sita í stýrinum. Hetta tí at tey mál, sum stýrið viðger, nærum uttan undantak snúgva seg um játtanir til verkætlanir, einstakar lærugreinar ella persónsmál, og í øllum hesum førum er ein lærari í stýrinum ógegniður.

Lat tað straks verða sagt, at tilmælini hjá nevndini um omanfyri nevndu lógarbroytingar allar eru grundaðar á drúgvar royndir í Danmark og eru í tráð við andan í longu eftirskúlasiðvenjuni.[61]

Nevndin mælir eisini til ta lógarbroyting, at meginreglan fyri starvssetanir á eftirskúlanum verður broytt. Meginreglan eigur at vera, at fólk við læraraprógvi undirvísa í kravdu lærtugreinunum á eftirskúlanum. Í kreativum lærugreinum og í handverki verður dentur lagdur á at fáa undirvísarar, sum hava drúgvar royndir og góðan fakligan kunnleika. Eitt tilmæli, sum eisini samsvarar við aðrar eftirskúlar.

Eftirskúlin er sum so einasta "skúlaskip" í landinum. Altavgerandi er, at tey fólk, sum undirvísa á eftirskúlanum hava neyvan kunnleika til einstaku lærugreinarnar ella tey øki, sum tey undirvísa í, tað veri seg handverk, list, rokning, mál, at bøta trol, motorar, at seta línu, o.a., og ikki minst, at tey sum undirvísa á eftirskúlanum hava stóran ans fyri tí, sum rørist í ungdóminum.

Vit hava hópin av dugnaligum fólkaskúlalærarum, sum fegnir vilja søkja nýggjar avbjóðingar, men tað forðar ikki fyri, at dugnaligir akademikarar, handverkarar, sjómenn, etc. eisini undirvísa á skúlanum. Tvørturímóti er tað ein stórur fyrimunur fyri allar partar, at skarin av undirvísarum hava fjølbroyttar royndir og vitan. Nevndin vil eisini vísa á, at hetta fjølbroytni samsvarar við teir eftirskúlar, sum vit hava samskift við.

## Lógarbroytingar - sjálvsáognarstovnurin og fígging

Tá ið ræður um kap. 4, leiðsluviðurskifti, mælir nevndin til lógarbroytingar, sum bæði samsvara við tey viðurskifti, sum gera seg galdandi fyri eftirskúlan í Suðuroy og danskar eftirskúlar. Verandi lóg tekur als ikki fyrilit fyri, at Kommunufelagið er partur av verkætlanini.

Eftirskúlin í Suðuroy er ein sjálvsognarstovnur, og landið og kommunurnar seta skúlan á stovn. Annar leistur enn hesin hevur ikki ligið í kortunum øll árini síðan eftirskúlalógin sá dagsins ljós.

Eftirskúlamálið hevur eina langa og drúgva søgu, so tá ið tað snýr seg um íløgupartin hava nógvir ymiskir møguleikar verið uppi at venda.

Í eftirskúlalógini frá 2000 stendur,[62] at íløguparturin verður býttur helvt um helvt millum land og kommunur. Í lógaruppskotinum frá 2007, tá ið landsstýrið legði málið um eftirskúla fyri tingið, mælti landsstýrið til, at skúlin skuldi rindast yvir raksturin.

Nevndin hevur gjørt rakstrarætlanir, ið vísa, at tað, sum loysir seg best fyri skúlans rakstur og næmingarnar, er ein leistur, sum er í samsvari við lógina, at landið rindar helvtina av íløgunum. Nevndin mælir til, at spurningurin um fígging verður tikin upp við politiska myndugleikan.

---

[61] Við støði í royndum hjá donskum eftirskúlum er torført hjá skúlum við flatari leiðslu at fáa nøktandi rakstur í skúlamar.

[62] §1.2 í eftirskúlalógini frá 17. mai 2000

Sambært lógini um eftirskúlar frá 2000[63] rindar landið 70 % av øllum rakstrinum. Næmingar/ foreldur og kommunur rinda restina av rakstrinum. Nevndin tekur undir við hesum leisti og var hetta býtið fyritreytin fyri at kommunurnar valdu at gerast partur av eftirskúlaverkætlanini. Men tað er ikki øll grundin, tí at um landið rindar 70 % av øllum rakstrinum átti at sloppist undan fløktari lóggávu um alment tilskot til næmingar á føroyska eftirskúlanum, væl at merkja um eftirskúlin fær heimild til at áseta næmingagjald eftir inntøkunum hjá foreldrunum.

Kommunurnar rinda næmingagjald efti tali av næmingum, sum koma úr avvarðandi lommunu.

Nevndarumboðini eru á einum máli um, at tað hevur avgerandi týdning, at eftirskúlin gevur øllum ungdómum møguleikan at ganga á eftirskúlanum, eisini teimum, sum eru illa fyri fíggjarliga. Bæði í Danmark og í Grønlandi eru stuðulsskipanir galdandi til tess at tryggja, at eingin ungdómur verður lopin um, tí at ráðini ikki eru til staðar.[64]

Eftirskúlin í Suðuroy er sum sagt ein sjálvsognarstovnur, og tí hevur tað stóran týdning at finna eina javnvág í samansetingini av skúlastýrinum. Kommunurnar, lærarafelgið og skúlaleiðarafelagið eru við í eftirskúlaverkætlanini, tí at tey hava trupulleikan við væntandi tilboðum til ungdómin tætt at kroppinum og vilja royna at byrga upp fyri, at ugdómarnir bara fara av landinum.

Til tess at tryggja hesum pørtum neyvt samband við eftirskúlan eiga Kommunufelagið, Føroya Lærarafelagið og Skúlaleiðarafelagið at velja hvør sítt umboð í skúlastýrið[65], og mælir nevndin til eina lógarbroyting, soleiðis at hetta kann lata seg gera.[66] Nevndin heldur eisini at tað er náturligt, at áhugabólkurin/stigtakararnir eisini velja eitt umboð. Eftirskúlin í Suðuroy er ein sjálvsognarstovnur, og landið og kommunurnar seta skúlan á stovn.[67]

Viðvíkjandi fíggjarliga rakstrinum annars er at siga, at eftirskúlin verðu rikin á vinnuligum grundarlagi, t.e. at hann skal geva yvirskot, sum skal nýtast allatíðina til at menna skúlan. Eftirskúlanevndin leggur doyðin á, at skúlin verður rikin á einum dyggum, haldgóðum grundarlagi, og at skúlin hevur eitt stýri, sum stendur mát við hesi krøv.

Eftirskúlanevndin leggur eisini alstóran dent á, at leiðslan á eftirskúlanum hevur góðan námsfrøðiligan førleika, dyggar royndir og konstruktivan hugburð til ungdómin.

Annars er at siga, at eftirskúlanevndin, umboðandi Kummunufelagið, Føroya Lærarafelag, Føroya Skulaleiðarafelag og stigtakararnar, hevur ábyrgdina av eftirskúlaverkætlanini. Eftirskúlanevndin hevur fingið heimild sum byggiharri,[68] og vil nevndin røkja sínar skyldur til verkætlanin er komin undir land.

---

63 § 1.1

64 Á grønlendskum eftirskúlum er ókeypis hjá ungdómum, tá ið inntøkan hjá foreldrunum er millum kr. 0 – 280.000,- Í Danmark veitist minst 500 kr. pr. næming pr. viku í tilskoti, tó soleiðis, at næmingar, sum ikki eru væl fyri fíggjarliga fáa nógv størri tilskot, heilt uppi rindan av øllum kostnaðinum.

65 Lagt er upp til eina viðgerð av øllum hesum spurningunum í Skjal 3, ískoyti.

66 Eftirsum talan er um ein sjálvsognarstovn og fyri at virða prinsippið um óhefta leiklutin hjá einum slíkum stovni, kundi verið tilskilað í lógini, at stýrisumboðini ikki skulu vera nevndarlimir í Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum ella Kommunufelagnum, ei heldur skulu teir verða politikarar.

67 Kommunufelagið kundi møguliga valt 2 umboð.

68 Smb. skriv frá Kommunusamskipan Føroya, dagfest 6. september 2006.



Álit 2015

Eftirskúlin í Suðuroy

Hvørji umboðini í eftirskúlanevndini eru

Eftirskúlanevndin er umboðað av Kommunufelagnum, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum og stigtakarunum.

Nevndarlimirnir eru: Heðin Mortensen, borgarstóri, formaður í Kommunufelagnum

Trúgvi Gudmundarson, borgarstjóri, Kommunufelagið

Herálvur Jacobsen, formaður í Føroya Lærarafelag

Magna Thomassen, Skúlaleiðarafelagið

Ólavur Rasmussen, nevndarformaður, umboðandi stigtakararnar

*

# Skjal 1

**Næmingar, ið hava lokið fólkaskúla**

| | | Mannf.<br>A | Konuf<br>B | Tils.<br>C |
|---|---|---|---|---|
| lokið 10. flokk | | | | |
| | 2000 | 294 | 228 | 522 |
| | 2001 | 283 | 247 | 530 |
| | 2002 | 287 | 289 | 576 |
| | 2003 | 286 | 292 | 578 |
| lokið 9. flokk | | | | |
| | 2000 | 320 | 299 | 619 |
| | 2001 | 344 | 324 | 668 |
| | 2002 | 389 | 378 | 767 |
| | 2003 | 381 | 374 | 755 |

**Fólkið skift á aldur, ár og kyn**

**31.12.2003**

| | Mannf. | Konuf. | Tils. |
|---|---|---|---|
| 10 ár | 367 | 380 | 747 |
| 11 ár | 387 | 397 | 784 |
| 12 ár | 407 | 414 | 821 |
| 13 ár | 454 | 426 | 880 |
| 14 ár | 445 | 398 | 843 |
| 15 ár | 403 | 394 | 797 |
| 16 ár | 371 | 336 | 707 |
| 17 ár | 362 | 340 | 702 |
| 18 ár | 367 | 333 | 700 |
| 19 ár | 339 | 305 | 644 |
| 20 ár | 357 | 256 | 613 |

- Formligi tørvurin á eftirskúla í Føroyum

| Dømi | næmingar | næmingatal | skúlar |
|---|---|---|---|
| I | 584 | 50 | 11 |
| I | 584 | 70 | 8-9 |
| I | 584 | 80 | 7 |
| II | 395 | 50 | 7 |
| II | 395 | 70 | 6 |
| II | 395 | 80 | 5 |
| III | 200 | 50 | 4 |
| III | 200 | 70 | 3 |
| III | 200 | 80 | 2-3 |
| IV | 183 | 50 | 4 |
| IV | 183 | 70 | 2-3 |
| IV | 183 | 80 | 2 |
| V | 175 | 50 | 3 |
| V | 175 | 70 | 2 |
| V | 175 | 80 | 2 |
| VI | 087 | 50 | 1-2 |
| VI | 087 | 70 | 1 |
| VI | 087 | 80 | 1 |

# Formligi tørvurin

# á eftirskúla í Føroyum

*- frá tí mest bjarta til tað mest dapra úrslitið*

## Støðan í Danmark

61.300 vóru født í Danmark í 1988.

Talið á 10.floks-næmingum í Danmark – t.e.: tey, ið eru 16 ár, født í 1988 – er 20 túsund – og av hesum ganga 14 túsund – t.e.: *70 prosent* - á eftirskúla.

34,2 prosent taka sostatt 10.floksprógv í Danmark.

Sostatt ganga 22,8 prosent í 10. flokki á eftirskúla.

Meginparturin av teim o.u. 41.300, sum ikki taka 10. floks-prógv, halda fram í útbúgvingarskipanini.

## Lutfallið í Danmark flutt á Føroyar

Talið á teimum, sum eru født í Føroyum í 1988, er 873.

Um 34,2 prosent av hesum gingu í 10. flokki, er talið 299.

Um 70 prosent av hesum fóru á eftirskúla, so høvdu 200 gingið í 10. flokki á eftirskúlanum.( III)

Ella vit siga, at í Danmark fara 22,8 prosent í 10. flokk á eftirskúla. Av 873 næmingum høvdu sostatt 199 næmingar farið í 10. flokk á eftirskúl í Føroyum

- Ein árgangur liggur um 800 – og taka vit 22,8 prosent av honum gevur tað 183. (IV)

## Veruligu tølini fyri Føroyar

I 2002 tóku 767 næmingar 9. floksprógv, av hesum tóku 578 næmingar 10. floks prógv í 2003.

Taka vit 22,8 prosent av 767 er talið 175. (V)

- Og 70 prosent av 578 gevur 395 næmingar, sum høvdu tikið 10. floksprógvið á eftirskúlanum – *um sama prosenttalið, sum er í Danmark, er grundarlagið.* (II)

Men munurin er 189 næmingar. Hvagar fara teir?

- 189 + 395 = 584 næmingar. (I)
- helvtin av 175 er 87 (VI)

# Skjal 2

**<u>Viðmerkingar til skjal 2:</u>**
Fyrsta talvan vísir at ungdómsárgangirnir í Danmark minkaðu í støðugum stórum nøgdum frá 1980 til 1999. Síðan vaks talið eitt sindur og hevur fyribils lagt seg í eina fasta legu, langt undir stóru árgangunum seinast í sjeytiárunum. Talvurnar 2 og 3 vísa, at talið av eftirskúlum og næmingum á eftirskúlum er støðugt vaksandi, hóast ungdómsárgangirnir hava verið fyri stórum falli. Fjórða talvan er eitt yvirlit yvir gongdina í Danmark frá 1971 til 2007, har talið av ungdómi verður samanborið við talið av eftirskúlum og eftirskúlanæmingum.

Sjálvandi skal ein vera varin at samanbera hesa tilgongd við føroysk viðurskifti, men hóast vit taka størsta varsemi er eingin ivi um, at sami tendensur ger seg galdandi í Føroyum. Tað er í hvussu so er ein sannroynd, at hópurin av føroyskum ungdómum, ella kanska rættari føroyskum foreldrum, metir, at eftirskúlin so ella so er besta tilboð, sum undirvísingarskipanin kann bjóða tí partinum av okkara ungdómi, sum ikki trívist í vanliga fólkaskúlanum.

Talva 1


Antal unge
14 - 17-årige
360.000
340 000
320.000
300.000
280.000
260.000
240.000
220.000
200.000
1971/72
1973/74
1975/76
1977/78
1979
1981
1983
1985
1987
1989
1991
1993
1995
1997
1999
2001
2003
2005
2007
2009
2011
Årstal

## Talva 2


Antal skoler
Efterskoler
300
250
200
150
100
50
0
1971/72
1973/74
1975/76
1977/78
1979
1981
1983
1985
1987
1989
1991
1993
1995
1997
1999
2001
2003
2005
2007
2009
2011
Årstal

**Talva 3**


Antal årselever
Årselever
30.000
25.000
20.000
15.000
10.000
5.000
0
1971/72
1973/74
1975/76
1977/78
1979
1981
1983
1985
1987
1989
1991
1993
1995
1997
1999
2001
2003
2005
2007
2009
2011
Årstal

# Talva 4


Udviklingen 1971 - 2007
Årselever
Skoler
14 - 17-årige
Indeks
400,0
350,0
300,0
250,0
200,0
150,0
100,0
50,0
0,0
1971/72
1973/74
1975/76
1977/78
1979
1981
1983
1985
1987
1989
1991
1993
1995
1997
1999
2001
2003
2005
2007
2009
2011
Årstal

# Skjal 3

## Kapittul 3
## Innskriving av næmingum

**§ 10.** Við fyriliti fyri lógini um eftirskúlan avger leiðsla eftirskúlans hvørjir næmingar takast upp.
Stk. 2. Næmingar hava sama rætt at verða innskrivaðir í eftirskúlan sum í fólkaskúlan, upp til evsta mark fyri næmingartalið fyri einstaka eftirskúlan.
Stk. 3. Stýrið fyri eftirskúlan kann áseta almennar reglur fyri innskrivingina.
Stk. 4. Heimstaðarkommunurnar hjá næmingunum skulu í september mánað hava boð um teir næmingar í kommununi, sum eru innskrivaðir í verandi skúlaári.
Stk. 5. Kommunur, sum saman við landinum rinda fyri stovnsetan av eftirskúla, hava rætt til næmingatal, ið samsvarar við fólkatalið/rindaðu upphæddina hjá ávísu luttakandi kommunu. Smb. kap. 6, stk. 6 í lógini um eftirskúlar.
Stk. 6. Kommunur, sum saman við landinum rinda fyri stovnsetan av eftirskúla hava altið framíhjárætt til næmingar um kommuna, sum tekur lut í stovnsetan av eftirskúla ikki nýtir kvotuna fult út. Er avlop av næmingum hava allar kommunur rætt til at yvirtaka kvotuna, tó soleiðis, at kommunur, sum ikki eru partar av stovnsetani, rinda lutfalsliga meiri fyri sínar næmingar.

**§ 11.** (sama sum í verandi lóg)

## Kapittul 4
## Leiðsluviðurskifti

**§ 12.** Eitt skúlastýri skal verða valt til hvønn eftirskúla. Limir tess eru:

1. 4 umboð fyri kommunurnar. Kommunusamskipan Føroya eigur 2 umboð og Føroya Kommunufelag somuleiðis 2 umboð.
2. 1 umboð fyri áhugabólk eftirskúlans.

Hesi hava øll atkvøðurætt. Stýrið skipar seg sjálvt.

Stk. 2. Tá ið ræður um námsfrøðiliga innihald skúlans er leiðslan óheft av stýrinum, tó soleiðis, at námsfrøðiligi leistur skúlans skal samsvara við endamálsorðingar og fíggjarkarmar skúlans.

Stk. 3. Er eingin kommuna knýtt at skúlanum, hava teir partar, sum rinda fyri eftirskúlan rætt til umboðini hjá kommununum.

Stk. 4 í verandi lóg fellur burtur.

## Kapittul 5
## Starvsfólkaviðurskifti

**§ 14.** Skúlastýrið setir skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk. Skúlaleiðarin gevur tilmæli um setan av lærarانum og øðrum starvsfólkum, sum stýrið tekur støðu til.
Stk.2. Skúlaleiðarin skal antin hava nomið ella skal nema sær góðkenda leiðsluútbúgving.
Stk.3. Starvsfólk á eftirskúla skulu hava besta fakligan førleika í viðkomandi lærugreinum.

**§16.** Starvsfólk skúlans hava rætt til í minsta lagi somu løn sum fólk í samsvarandi størvum í fólkaskúlanum.
Stk. 2. Skipað starvs- og lønarviðurskifti skulu við starvssetan tryggjast starvsfólkum eftirskúlans.

# Skjal 4

## Talið av eftirskúlanæmingum til verandi skúlaár

Økta tilgongdin av næmingum á donskum eftirskúlum hevur staðið við øll árini.
Samanberingar við árini 2012/13 og 2014/15 eru at lesa á blaðsíðu 17 í álitinum.

